**Pf Postverk Føroya sóknast eftir**

# STJÓRA

**Uppgávan**
Postverk Føroya stendur á gáttini til eina nýggja, spennandi og avbjóðandi framtíð, nú tað er vorðið partafelag.

Í hesum sambandi søkja vit ein framskygdan og eldhugaðan stjóra, ið hevur úrslit fyri eyga. Høvuðsuppgávan verður at leggja eina langtíðarætlan fyri Postverk Føroya, soleiðis at Postverk Føroya gerst eitt nútímans, kappingarført felag. Tú fært, saman við einum dugnaligum leiðslubólki, høvuðsábyrgdina av strategiskari ráðlegging og framtíðarmenning av fyritøkuni.

**Førleiki**
Sterkir persónligir eginleikar so sum arbeiðssemi, ágrýtni, skapanarlyndi og slagdygd eru av alstórum týdningi. Postverk Føroya er eitt tænastufelag burturav, sum røkkur út til alt Føroya fólk, og tí er alneyðugt, at tú dugir væl við fólki, samskiftir skilliga og skynsamt, og skapar ein stimbrandi liðanda fyri alla fyritøkuna.

Tú hevur í minsta lagi 5 ára viðkomandi starvsroyndir. Tað er fyrimunur at hava starvsroyndir úr útheiminum, og at kunna vísa á úrslit. Tú hevur strategiska, búskaparliga útbúgving á kandidatstøði, sum t.d. Cand. Merc., Cand. Polit. ella Cand. Oecon. Tú ert framskygd/ur, dugir væl at arbeiða strategiskt og málrættað, og megnar at skapa úrslit. Harumframt ert tú vanur/von at tosa og samskifta flótandi á føroyskum, donskum og enskum. Tosar tú eisini eitt fjórða mál, er hetta bert ein fyrimunur.

**Postverk Føroya bjóðar tær**
Eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv. Starvið er eisini sera krevjandi, tí tú sum stjóri verður undangongumaður/kvinna, og fært høvuðsábyrgdina av allari framtíðarmenning av Pf. Postverk Føroya. Vit bjóða tær tí góða løn samsvarandi førleikum og royndum.




# UMSÓKN

**Send okkum eina umsókn við viðkomandi prógvum og viðmælum áðrenn 1. juli 2006. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknin skal sendast til :**

**Pf. Postverk Føroya**
**att. Jan Danielsen**
**Óðinshædd 2**
**100 Tórshavn**

**Áhugað eru vælkomin at ringja til:**
**Jan Danielsen, nevndarform. á tlf. 21 72 00 ella Brynhild Setberg, næstformann á tlf. 21 22 71, fyri at hoyra nærri um starvið.**

Postverk Føroya

**Postverk Føroya · Óðinshædd 2 · FO-100 Tórshavn · Tlf: 34 60 00 · Fax: 34 60 01 · postur@postur.fo · www.postur.fo**



# BREIÐBAND FRÍ NÝTSLA

NÝGGIR BREIÐBANDPRÍSIR GALDANDI FRÁ 13. JUNI 2006

| FERÐ | FRÍ NÝTSLA | MÐR. GJALD | PRÍSIR | FRÍ NÝTSLA | EYKAGJALD FYRI FRÍA NÝTSLU | MÐR. GJALD ÍALT |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 256/128 | 200 Mb | 159,00 | 50 oyru/Mb kl. 08-18 og 40 oyru/Mb kl. 18-08 | - | 120,00 | 279,00 |
| 512/256 | 500 Mb | 225,00 | 50 oyru/Mb kl. 08-18 og 40 oyru/Mb kl. 18-08 | - | 160,00 | 385,00 |
| 1024/256 | 3 Gb | 450,00 | 50 oyru/Mb kl. 08-18 og 40 oyru/Mb kl. 18-24 | kl. 24-08 | 170,00 | 620,00 |
| 2048/512 | 6 Gb | 715,00 | 50 oyru/Mb kl. 08-18 og 40 oyru/Mb kl. 18-24 | kl. 24-08 | 270,00 | 985,00 |

EYKAHALD VIÐ FRÍARI NÝTSLU

Stovning av breiðbandi: Kr. 750,00 kr. (Ókeypis stovning fram til 1. juli).
Umskifti frá vanligum breiðbandi til breiðband við fríari nýtslu fyri verandi kundar: Kr. 550,00
Stovning av breiðbandi við fríari nýtslu fyri nýggjar kundar: Kr. 550,00
Uppflyting av linjuferð: Ókeypis
Niðurflyting av linjuferð: Kr. 299,00
ALLIR PRÍSIR ERU TREYTAÐIR AV AT TÚ TEKNAR I-NET PRIVAT BREIÐBANDHALD FRÁ FØROYA TELE Í 6. MÐR.
MONTØRGJALD OG MÓTALD ER IKKI ÍROKNAÐ.

TÍN TRYGG FYRI SKJÓTT, STØÐUGT OG TRYGT BREIÐBAND!

I-net BREIÐBAND PRIVAT

FØROYA TELE

*Skapið framtíðina saman við okkum...*

pet ur & pet ur - 320870